Sosialurin
# VARPIÐ
F R Í G G J A D A G U R  10.  f e r u a r  2 0 0 6



**Agurk 11**

svf

Tú skalt nýta hjálm tá tú koyrir á prutli, og tú skalt gera lýsing, tá Agurk sigur, tú skalt gera lýsing. Hevur tú? Ikki? Well, tað finna vit útav í kvøld, tá Agurk er aftur. Vit skulu síggja onkran fremmandan film, og okkurt løgið verður víst - okkurt løgið, sum onkur av tykkum hevur gjørt. Hvat varð av nýggjársskemtinum? Har kom bara eitt inn - og tað kanst tú eisini síggja í kvøld. Agurk er aftur, og hon er sterktbend.

**Mánadag 13. kl. 21.05**



**Ymisk lív 5**

Fanny Olsen er 74 ára gomul og býr í Árnafirði. Hon eigur og rekur einasta handilin í bygdini og sjálvt um tað bara eru einir 4-5 kundar um dagin, møtir hon trúføst upp til arbeiðis hvønn morgun. Hetta, og at búgva í Árnafirði, hevur fyri henni verið júst tað rættað. Marjun King úr Leirvík, harafturímóti, hevur altíð tráðað eftir at sleppa út í verðina. Longu sum heilt ung droymdi hon um fjarskotin og eksotisk lond og sum 20 ára gomul gjørdi hon av at fylgja dreyminum og byrja eina karrieru uttanlanda. Hon hevur búð og arbeitt nógvastaðni, seinastu 20 árini í London.

**Sunnudag 12. kl. 20.00**

svf

**Alt um mammu**

DR1

Sonur Manuelu, Esteban, verður yvirkoyrdur og doyr. Manuela grætur og grætur til eingi tár eru eftir. Hon fær at vita, at beint áðrenn Esteban doyði, leitaði hann eftir pápa sínum, sum hann ongantíð hitti. So Manuela fer at leita eftir Lola, pápa Esteban, sum hon fór frá fyri 18 árum síðan. Pedro Almodóvar hevur leikstjórnað. Filmurin er 1999 og hevur vunnið ein hóp av virðislønum.

**Mikudag 15. kl. 21.00**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**